# Norðurlendskar forkvinnur á stýrisfundi

**Forkvinnurnar í norðurlendsku sjúkrarøktarfrøðingarfeløgunum vitja í Føroyum til stýrisfund**



SJÚKRARØKT

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í hesum døgum hevur stýrið fyri SSN, Sykepleiernes Samarbeid i Norden, stýrisfund í í Føroyum. SSN, sum er felagið fyri tey seks sjúkrarøktarfrøðingarfeløgini í Norðurlondum, verður saman her í døgunum 27. – 30. mars, og sum partur av fundinum, verður skipað fyri kunningartúri til Suðuroyar, hvar vitjað verður á Suðuroyar Sjúkrahúsi, Heimarøktini, Røktarheiminum og Sambýlinum.

### Viðgera felags evni

Stýrið hjá SSN er hægsti myndugleiki í SSN og er mannað við forkvinnunum úr teimum seks landsfeløgunum. SSN er í fyrsta umfari eitt forum fyri limafeløgini, har til ber at taka upp evni og mál, sum hava felags áhuga innan fakfelagsøkið, samfelagspolitiska økið og áhugamál annars. Harumframt skal SSN leggja seg eftir at samskipa tiltøkini hjá limafeløgunum í øðrum norðurlendskum, evropeiskum og altjóða samanhangi. Málið, sum verður brúkt í SSN er skandinaviskt

### Gamalt felag

Tað var í 1920, at umboð fyri sjúkrarøktarfrøðingarfeløgini í Danmark, Finlandi, Norra og Svøríki tóku seg saman og stovnaðu SSN. Íslendska felagið gjørdist limur í 1923 og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar fekk limaskap í 1998.

Vit fara at hava samrøðu við forkvinnuna í norska sjúkrarøktarfrøðingarfelagnum, Bente G.H. Slaatten, í blaðnum í morgin.

# Føroyskur páskatónleikur í Keypmannahavn, Tórshavn og Nólsoy

**Danir, føroyskir útisetar og føroyinga í Føroyum sleppa um páskirnar at uppliva frálíka sangbólkin Mpiri, við einum serligari páskasangskrá**

KONSERTFERÐ

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Útiseta sangbólkurini Mpiri fer aftur í vár á konsertferð, ferðin byrjar í Keypmannahavn mikukvøldið í Samuelskirkjuni og vikuna eftir í Simeonskirkjuni. Síðan fer kórið til Føroyar at syngja í Vesturkirkjuni og í Nólsoyar Kirkju.

Konsertskráin hjá Mpiri í vár hevur páskini sum tema. Skráin er samansett av páskatónleiki úr ymsum londum og tíðarskeiðum. Ein partur av tónleikinum er føroyskur, hetta eru gamlir páskasálmar í nýggjari útseting og eisini heilt nýskrivaður tónleikur. Sum heild fevna konsertirnar breitt, heilt frá gregorianskum sangi til nýggjan kórtónleik. Á skránni eru verk eftir millum onnur: Francis Poulenc, Kára Bæk, Per Nørgård, Urmas Sisask og Arvo Pärt.

Mpiri varð stovnað fyri 8 árum síðani og bleiv fram til 2002 stjórnað av Sunleivi Rasmussen. Núverandi kórleiðarin eitur Gorm Larsen. Hann er útbúgvin kór- og orkesturleiðari frá Kongaliga Danska Musikkonservatoriinum og hevur eisini lært á Royal College of Music í London og lisið Tónleikavísund á Universitetinum í Århus. Mpiri hevur verið á fleiri konsertferðum millum annað til Føroya, Íslands, Týsklands, Finnlands og Svøríkis.

Bólkurin hevur sum endamál at syngja nýggjan føroyskan tónleik og hevur í fleiri umførum bílagt nýggj verk frá føroyskum tónaskøldum. Frumframførslur eru tí javnan á skránni á konsertunum hjá Mpiri. Serliga verk eftir unga tónaskaldinum Tróndi Bogasyni, ið eisini syngur tenor í vokalbólkinum. Hesin nýggi føroyski tónleikurin varð savnaður á fløguni Asbest, ið Mpiri gav út í 2003.

Í sambandi við Føroyaferðina fer Mpiri at taka upp 3 verk hjá Kára Bæk til nýggja fløgu við føroyskum kórtónleiki. Hesi verk verða eisini at hoyra á konsertunum.

**Konsertskráin er henda:**

29. mars: Kl. 20:00 - Konsert í Samuelskirkjuni Thorsgade 65, Keypmannahavn
05. apríl: Kl. 20:00 - Konsert í Simeonskirkjuni, Sjællandsgade 12B, Keypmannahavn
08. apríl: Kl. 15:00 - Konsert í Vesturkirkjuni, Tórshavn
09. apríl: Kl. 16:00 - Konsert í Nólsoyar Kirkju

# »Syngið við kvøld« á Oyrarbakka

**Leygarkvøldið 1. apríl skipar Sundakórið fyri einum »Syngið við kvøldi« í Eydnuni á Oyrarbakka**

SANGUR

Á skránni er, sum heitið eisini ber boð um, nógvur felagssangur. Sungnir verða bert føroyskir sangir, sum standa í nýggjastu útgávuni av Føroya Fólks sangbók. Zakarias Sørensen, sum gjørdi eina nótabók til sangirnar í tí nýggjast útgávuni av Føroya Fólks, verður við, og skal geiða frá søguni hjá nøkrum av sangunum.

Eisini verða ymiskar framførslur av tónleiki og sangi. Sundakórið fer at framføra nakrar sangir, Kingobólkurin úr Tjørnuvík kemur at framføra, eitt skúlaorkestur úr Norðskála/Oyrar skúla skal eisini spæla tveir sangir og so skal eisini onkur einstaklingur framføra sang.

Ein lítil máltíð verður at fáa. Tað er Gjárgarður, sum ger hesa máltíðina, so tað verður helst gott.

Sundakórið hevður skjótt trý ár á baki. Kórið er eitt blandað kór við uml. 35 sangarum. Tað er Hans Olivur Joensen, sum er kórleiðari.

Hetta er aðru ferð at kórið skipar fyri einum slíkum tiltaki og vóna fyrireikarnir at hetta eydnast líka væl sum seinast og at nógv koma at syngja við.

»Syngið við kvøldið« byrjar kl. 19.30, sigur Sundakórið í tíðindaskrivi.

# Bjarni skal svara um Sosialin

**Heidi Petersen vil hava at vita, hvørjar heimildir Føroya Tele hevur, nú felagið hevur keypt minnilutapart í Sosialinum**

PARTAFELAG

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í fyrsta lagi vil Heidi hava at vita, hvørt landsstýrismaðurin var kunnaður um handilin, tá Føroya Tele var við at keypa Sosialin. Hartil vil løgtingskvinnan hava at vita, hvørt nevndin í Føroya Tele var kunnað um handilin.

Hartil verða tríggir fyrispurningar settir, sum seta spurnartekin við heimildina og rættleikan hjá almenna partafelagnum at vera við til slíkan handil. Spurt verður, hvørt keypið av parti av Sosialinum liggur innan virkisøkið hjá Føroya Tele. Hvørt landsstýrismaðurin sær nakrar trupulleikar í, at Javnaðarflokkurin við Føroya løgmanni sum formanni selur ogn við almennum partafelag sum einum av keyparunum. Og hvørt ein slíkur handil kann skapa ójavnvág í føroyska blaðheiminum.

Í viðmerkingunum til fyrispurningin, sigur løgtingskvinnan hjá Tjóðveldisflokkinum, at hon kennir seg nakað ørkymlaða, tá eitt alment partafelag fer inn á annað virkisøki enn tað, sum er lýst í løgtingslógini um umlegging av Telefonverki Føroya.

Hon vísir á, at endamálið hjá felagnum í lógartekstinum verður lýst at vera fjarskifti, og at lógarbroyting krevst, um felagið ynskir at fara í aðra vinnu.

Og at enda spyr tingkvinnan – sum eigari og kundi hjá Føroya Tele – um hon kann kenna seg trygga við teimum disponeringum, sum felagið tekur. Og hvørt tað er rætt, at almennar fyritøkur á hendan keypa seg inn í privatar fyritøkur.